## Avtala um fráboðanarform og fráboðanarfreist millum øðrumegin Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og hinumegin Føroya Arbeiðarafelag

Partarnir viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum at lýsa og seta í verk arbeiðssteðg eftir ásetingunum niðanfyri.

Stk. 2. Fráboðan um arbeiðssteðg, eisini samhugaarbeiðssteðg, skal vera skrivlig og latin mótpartinum minst 48 tímar undan arbeiðssteðginum. Roknað verður til á midnátt.

Stk. 3. Fráboðanin skal greitt siga frá, hvønn arbeiðssteðg, talan er um, og hvussu víðfevndur arbeiðssteðgurin er.

Stk. 4. Arbeiðssteðgur kann ikki verða fráboðaður, meðan sáttmálin er í gildi. Er sáttmálin farin úr gildi, kann arbeiðssteðgur ikki verða fráboðaður, fyrr enn samráðingar um nýggjan sáttmála eru endaðar. Er semingsstovnurin komin uppí, ella er semingsstovnurin boðsendur, eru samráðingarnar at meta sum endaðar, tá ið semingsstovnurin er givin við semingsroyndini, og hevur boðað frá tí.

Stk. 5. Partarnir eru samdir um at møgulig undantøk eiga at at verða viðgjørd í góðari tíð áðrenn arbeiðssteðgur verður lýstur.

Stk. 6. Hendan avtalan kann sigast upp við 6 mánaða freist til at fara úr gildi saman við sáttmálunum partanna millum. Fæst ikki semja um nýggja avtalu fyri hesa, fer hendan avtalan ikki úr gildi, fyrr enn sáttmálarnir millum partarnar eru endurnýggjaðir.

Stk. 7. Hendan avtalan fær gildi frá 1. juli í 2014.

*Í Tórshavn 2. Septembur 2014*

Føroya Arbeiðarafelag

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið